# Krevur meiri samstarv øll tey trý sjúkrahúsini

**Nú verður kravt at tey trý sjúkrahúsini í Føroyum fara undir eitt skipað samstarv fyri at geva sjúklingunum so góða tænastu sum tilber**

NÝGGJ SJÚKRAHÚSLÓG
*Áki bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skulu øll tey trý sjúkrahúsini í Føroyum samstarva nógv meiri enn tey gera.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í heilsumálum, sigur, at í sjúkrahúslógini, sum hann nú hevur lagt fyri løgtingið, er lagt upp til, at tey trý sjúkrahúsini skulu hava eitt skipað samstarv í framtíðini.

-– Eitt økt samstarv kemur serliga upp á tal, tá ið fast samband verður millum Leirvík og Klaksvík, og tann stytta flutningstíðin hevur við sær møguleikar fyri heilt nýggjum møguleikum fyri stórrakstri.

– Tey trý sjúkrahúsini skulu hava beinleiðis skyldu til at veita hvørjum øðrum tænastur, ið kunnu bøta um viðgerðartilboðini, sigur Hans Pauli Strøm.

Hann sigur, at eitt slíkt samstarv fer eisini at føra við sær meiri fæst fyri játtanirnar til tey trý sjúkrahúsini.

Tað er eisini ætlanin at tey trý sjúkrahúsini skulu kunna gera samstarvsavtalur fyri at bøta um viðgerðartilboðini og raksturin.

Harafturat stendur í lógini, at sergreinir kunnu setast á stovn á øllum sjúkrahúsunum.

Hans Pauli Strøm sigur, at í hesum liggur, at sjúkrahúsini fáa skyldu til at hjálpa hvørjum øðrum við ymsum sjúkrahústænastum. Tað merkir, at eitt sjúkrahús, sum hevur eina ávísa tænastu, skal hava skyldu til at veita einum øðrum hesa tænastu, sum ikki hevur hana frammanundan.

Somuleiðis skulu sjúkrahúsini arbeiða meiri í felag. Tað merkir, at er ikki orka til eina ávísa viðgerð á einum sjúkrahúsi, kanska tí bíðitíðin er órímiliga long, skal sjúklingur vísast til eitt annað sjúkrahús, sum kann veita líka góða viðgerð á økinum, er bíðitíðin styttri har.

Ein trupulleiki, sum tey smáu sjúkrahúsini hava havt, er, at skipanin, har serlæknar á Landssjúkrahúsinum skuldu ferðast út á smáu sjúkrahúsini við millumbilum, hevur ikki virkað væl.

Suðuroyar Sjúkrahús sigur, at oyrnalæknin kemur næstan ikki longur og bæði røntgenlæknar, og narkosulækni og serlæknar í medisini, eru givnir at ferðast til Suðuroyar Sjúkrahús.

Hans Pauli Strøm sigur, at hetta er ein sáttmálaspurningur. Samráðingar hava verið í langa tíð ímillum serlæknafelagið og fíggjarmálaráðið um tey lønarískoyti yvirlæknarnir skulu hava fyri at veita hesa tænastu.

Landsstýrismaðurin í heilsumálum sigur, at sum hann hevur skilt støðuna, eru hesar samráðingar við at koma undir land so at hendan tænastan til smáu sjúkrahúsini kann takast uppaftur.

NÝGGJ SJÚKRAHÚSLÓG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í visitatiónsnevndini, sum greitt er frá í greinini um serviðgerð uttanlands, er ætlanin, at átta limir skulu verða.

Sjey av teimum skulu vera fakfólk, men sjúklingarnir skulu eisini hava eitt umboð í visitatiónsnevndini.

Øll trý sjúkrahúsini skulu verða umboðað í nevndini, umframt umboð fyri røktarfrøðina, umboð fyri politiska myndugleikan og umboðið fyri sjúklingarnar,

Í nevndini skulu sita:

- Eitt umboð fyri Almanna- og heilsumálaráðnum,
- Ein yvirlækni frá Klaksvíkar sjúkrahúsi,
- Ein yvirlæknifrá Suðuroyar sjúkrahúsi,
- skurðdeildini á Landssjúkrahúsinum,
- Ein yvirlæknifrá heiliráðsdeildini á Landssjúkrahúsinum,
- Læknastjórin á Landssjúkrahúsinum,
- Ein sjúkrarøktarfrøðingur frá einum av sjúkrahúsunum og
- Eitt leikfólk frá sjúklingafeløgunum.

Landsstýrismaðurin skal velja heilsufakligu limirnar í nevndini eftir tilráðingum frá sjúkrahúsunum og leikfólkið skal veljast eftir tilráðing frá sjúklingaráðnum. Landsstýrismaðurin ger eisini av, hvør verður formaður í nevndini og, hvussu leingi nevndin skal sita.

Mett verður, at tað hevur týdning, at leikfólk frá sjúklingafeløgunum er í visitasjónsnevndini, ti sum heild fer hetta at styrkja legitimitetin og umdømið mótegis almenninginum. Tað kann eisini gera, at sjúklingafeløgini fáa eina betri fatan av arbeiðinum og raðfestingini hjá visitasjónsnevndini.

Ætlanin er, at nevndin skal setast soleiðis saman, at øll mál, har sjúklingar skulu sendast uttanlands, kunnu lýsast bæði fíggjarliga, fyrisitingarliga, læknafakliga og sosialt.

# Smáu sjúkrahúsini varðveita sín leiklut

**Virksemið hjá teimum smáu sjúkrahúsunum verður ikki skert, staðfestir hans Pauli Strøm, landsstýrismaður**

NÝGGJ SJÚKRAHÚSLÓG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tey smáu sjúkrahúsini vera ikki verri fyri, sigur Hans Pauli Strøm*

– Tey smáu sjúkrahúsini skulu varðveita sína leiðslu. Og tað verður eisini staðfest, at tey skulu hava minst ein medisinskan og ein kirurgiskan yvirlækna.

Tá ið nýggja sjúkrahúslógin var til viðgerðar í løgtinginum, vóru tað fleiri tingfólk, sum vóru vís í, at lógin fór føra við sær, at tey smáu sjúkrahúsini verða avmonterað.

Eitt nú varð fýlst á, at ætlanin er er avtaka bæði leiðslur og yvirlæknar á teimum smáu sjúkrahúsunum.

– Hetta er ikki rætt, staðfestir Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í heilsumálum.

Hann sigur, at bæði í lógini, sum nú er, og í uppskotinum til nýggja lóg, er staðfest, at í føroyska sjúkrahúsverkinum eru trý sjúkrahús.

Og tað stendur eisini at tey trý sjúkrahúsini skulu vera Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar Sjúkrahús og Suðuroyar Sjúkrahús.

– Í lógini sum er, stendur ikki eitt orð um, at hvørt sjúkrahús skal hava sína egnu leiðslu og tað stendur so heldur ikki í uppskotinum, sum nú er til viðgerðar. Men tað er heilt givið, at hvørt sjúkrahús má hava sína leiðslu og tað verður ikki pilkað við tað.

## Skulu hava minst tveir læknar

Hinvegin stendur í lógini sum er, at tey smáu sjúkrahúsini skulu mannast við minst einum kirurgiskum og einum medisinskum yvirlækna.

Tað er eisini rætt, at ongin áseting er um hetta í uppskotinum, sum Hans Pauli Strøm legði fyri løgtingið.

Nú nýggj lóg skal gerast, hava bæði Suðuroyar Sjúkrahús og Klaksvíkar Sjúkrahús boðað frá, at í hesum tíðum, har miðsavning er loysunarorðið, er tað umráðandi, at tað verður sett í aftur lógina, at tey smáu sjúkrahúsini skulu hava minst ein kirurgiskan og ein medisinskan yvirlækna.

Og hetta verður nú gingið á møti.

Í vikuni hevur landsstýrismaðurin verið á fundi í trivnaðarnevndini hjá Løgtinginum um nýggju sjúkrahúslógina.

Har var eisini spurningurin um yvirlæknarnar á teimum báðum smáu sjúkrahúsinum, umrøddur.

– Eg boðaði trivnaðarnevndini frá, at hetta er ikki ein avgerðandi spurningur fyri meg, so elvir tað til ótryggleika, at hendan ásetingin er tikin út lógini, er trivnaðarnevndin vælkomin at seta hana í aftur.

– Ùrslitið var, at vit avtalaðu, at trivnaðarnevndin skal seta í aftur lógina, at tey smáu sjúkrahúsini eru mannað við minst einum medisinskum og einum kirurgiskum yvirlækna.

Ella verður ein onnur orðing funnin sum ber á sama borðið og sum ásetir eitt minstamark fyri, hvussu læknaliga manningin á smáu sjúkrahúsinum skal vera.

## Vildu ikki binda leiðslurnar

Hann sigur, at orsøkin til at tað varð tikið burturúr uppskotinum, er at tey smáu sjúkrahúsini hava havt trupulleikar við at halda akkurát tann partin í lógini. Hann vísir á, at í Suðuroyar Sjúkrahúsi eru tríggir kirurgiskir yvirlæknar og ongin medisinari.

– Tí haldi eg, at tað er skeivt, at tað stendur í lógini, at tað skal vera ein medisinskur yvirlækni á teimum smáu sjúkrahúsunum, tí eg haldi, at tað er leggja ov stórar bindingar á leiðsluna.

– Hans Pauli Strøm heldur, at tað kann hugsast, at annað av teimum smáu sjúkrahúsunum fer at spesialiserað seg í medisinskari viðgerð og sostatt heldur vildi havt fleiri medisinskar yvirlæknar, ella øvugt, at tey heldur vildi leggja dent á kirurgi og tí helt hann, at leiðslurnar áttu at hava frælsi at skipa seg.